ítróttur

Nr. 155 • mikudagur • 18. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Trongligt frammarlaga á vøllinum

**Umframt at Todi Jónsson er afturkomin, eigur tað at vera upplagt at flyta toppskjúttarar í landskappingini eitt stig longri fram, enn teir higartil hava verið**

FØROYAR-MALTA
*Jóannes Hansen*

Tað er synd at siga, at tað hevur verið í framrættaða partinum, at tyngdin í føroyska landsliðnum hevur verið størst. Síðani fyrstu FIFA royndina fyri sekstan árum síðani er er nakað broytt. Nógvu tey fyrstu árini var tað ein bardagi og og kring føroyska brotsteigin fyri at byrgja fyri. Seinnu árini hevur spælið verið betri, og føroysku spælararnir hava torað betri at bjóða seg til, men tað hevur verið sjón fyri søgn, at tyngdin og broddurin í álopsspælinum hava ikki verið nakað at reypa av.

Nú tykjast møguleikarnir fyri meiri tyngd í álopspartinum at vera betri, enn teir hava verið. Hetta er áhugavert, og samstundis ber tað spurningar við sær til venjaran, hvussu hann skal fara til verka. Dysturin ímóti Malta má metast sum fyrsti og síðsti møguleikin at fyrireika seg til útidystin í Sveis og heimadystin ímóti Fraklandi. Men samstundis er mótstøðuliðið á Svangaskarði í kvøld av sovornum slagi, at tað er upplagt, at Føroyar fara at royna at seta dagsskránna. Tað vil við øðrum orðum vera við til at seta dagsskránna.



*Súni Olsen hevði einki havt ímóti, um hann í dag fekk møguleikan longur frammi á vøllinum, men hann staðfestir, at hann spælir, har sum venjarin heldur seg gera størstu nyttuna0*

### Nýggju møguleikarnir

Todi Jónsson er eftir steðg í meiri enn trý ár aftur á landsliðnum. Tað er í sær sjálvum rættuliga spennandi, og ivaleyst økir tað um trúnna millum hinar spælararnar um, at tað eigur at bera til at spæla á mótstøðuhálvuni.

– Eg gleði meg at vera aftur á landsliðnum. Summar av liðfeløgunum havi eg spælt saman við, men har eru eisini onkrir nýggir, sum eg ikki havi spælt saman við, sigur Todi Jónsson. Hann heldur seg vera væl fyri, men hann hevur ikki verið á FCK liðnum síðstu ferðirnar. Um og hvussu hetta ávirkar dystarførleikan, fæst at síggja í kvøld.

Eingin ivi kann vera um, at Todi verður annar álopsspælarin. Spurningurin er, hvør verður undir liðini á honum. John Petersen er tann, sum fyrst rennur í hugan. Hann hevur í flestu av sínum mongu landsdystum verið álopsspælari, og hann er framvegis eitt gott boð. Men nú eru tað eisini aðrir møguleikar, sum tað hevði verið rættuliga áhugavert at roynt.

Rógvi Jacobsen hevur higartil í ár verið álopsspælari á meistaraliðnum, og hann eigur sín stóra lut í, at HB er sannførandi oddalið. Rógvi hevur skorað níggju mál og er toppskjútti í landskappingini. Sjey ella átta av málunum hevur hann skorað við høvdinum. Hóast hann á landsliðnum so at siga bara hevur verið miðvallari í vinstru, hevur hann eisini á landsliðnum skorað við høvdinum. Tað hevði verið spennandi á landsliðnum at sæð Rógva undir liðini á Toda. Um innleggini frá Jákupi á Borg í høgru og úr vinstru verða kvalifiserað, hevði Rógvi havt góðar møguleikar at roynt við høvdinum ímóti málinum og ikki minst við høvdinum at stýrt bóltinum til Toda Jónsson.

Hevur tú hugsað um, at tú hesa ferð kanska fer at fáa møguleikan í álopinum?

– Tað havi eg ikki. Eg havi verið 25 ferðir á landsliðnum. Tað er bara síðsta árið, at eg havi verið millum teir fyrstu ellivu. Um venjarin heldur, at eg skal vera við ímóti Malta, so verði eg fegin um tað. Á útivølli ímóti Kekkia varð eg skiftur inn í álopið, men annars havi eg so at siga bara verið miðvallari. Men eg hevði einki havt ímóti at fingið møguleikan undir liðini á Toda Jónsson í álopinum. Men har eru nógvir um boðið, staðfestir Rógvi Jacobsen.

### Súni er skarprættari

Sum omanfyri nevnt, so hevur Rógvi Jacobsen fyri tað mesta verið miðvallari í vinstra borði. Um venjarin velur at flyta Rógva fram í fremstu røð, so verður næsti spurningurin, hvør so skal spæla í miðvallarplássinum í vinstru.

Á miðvøllinum eru nógvir um boðið. Nú Julian Johnsson og Fróði Benjaminsen eru tøkir, eru teir favorittar til sentralu miðvallarplássini, sum teir so leingi hava so at siga átt patent uppá, og Jákup á Borg hevur leingi verið meiri ella minni sjálvskrivaður í høgra borði. Aðrir miðvallarar eru eitt nú Atli Danielsen og Jann Ingi Petersen, og bæði Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør hava ofta verið miðvallarar í vinstru.

Mest spennandi royndin hevði kortini verið, um venjarin hesa ferð hevði valt at flutt Súna Olsen eitt stig fram.Higartil hevur hann bara verið vongverji á landsliðnum.

– Eg havi ikki hugsað um hatta. Tað er mær ein heiður at spæla fyri Føroyar. Um venjarin sigur, at eg skal vera vongverji, so spæli eg har. Um hann sigur, at eg skal vera á miðvøllinum, so hevði tað verið spennandi, sigur Súni Olsen.

Í landskappingini er Súni Olsen eitt nú saman við Rógva Jacobsen toppskjútti. Av teimum níggju málunum, sum Súni hevur skorað, hevur hann fingið tey átta í fýra teimum seinastu royndunum. Á GÍ liðnum hevur hann verið sentralur miðvallari og framrættaður miðvallari ella hangandi álopsspælari.

– Jú, tað hevur gingið væl hjá GÍ, og eg havi verið heppin at fáa fleiri mál síðstu vikurnar. Men, sum áður sagt, so taki eg við avbjóðingini, sum venjarin gevur mær, um hann heldur, at eg skal vera á liðnum í kvøld, staðfestir Súni Olsen.

### Spennandi lið

Tað kann væl vera, at venjarin velur at Rógvi skal vera á miðvøllinum, og at Súni skal vera á vongverjanum. Men um hann velur at royna møguleikan, sum er nevndur omanfyri, so er síðsti spuringurin, hvør so skal vera vongverji í vinstru. Her eru ikki so nógvir møguleikar. Pól Thorsteinsson hevur havt hesa ódnina tvær ferðir. Tær ferðirnar hava víst, at Pól hoyrir heima í miðverjuni ella í høgra borði.

Hin møguleikin er, at Johan Byrial Hansen verður vinstri vongverji. Tað hevur hann roynt fleiri ferðir, og tað hevði kanska ikki verið so býtt at havt so at siga ein orduligan verjuspælara í hesum plássinum, um Súni fekk møguleikan longri frammi.

Hetta liðið hevði ikki verið so galið at sæð í kvøld: Jens Martin Knudsen - Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, John B. Hansen - Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson, Súni Olsen, Rógvi Jacobsen, Todi Jónsson.

Sera spennandi uppstilling. Men John Petersen og Jann Ingi Petersen hava verið fastir menn á liðnum nógvu tær seinastu ferðirnar. Landsliðsvenjarin hevur við øðrum orðum ein positivan trupulleika, og tað er ikki so galið!

## B36 kærir leikbann

Einki er at ivast í, at tað tók fast hjá B36, at teir um vikuskiftið taptu 2-0 fyri GÍ.

Fyrst og fremst, tí seinasti møguleikin at vinna seg heilt fram í oddin ivaleyst fór við hesum, men eisini tí tey í árstalsfelagnum hildu seg verða snýtt, tá dómarin fyrst dømdi brotsspark og síðani rak B36-málverjan av vøllinum, tá ikki meira enn lítið korter var farið av dystinum.

Hetta seinasta hevur nú eisini viðført, at B36 fer at kæra um reyða kortið, sum málverjin fekk.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, váttar, at teir hava sent kæru inn, men hann undirstrikar, at teir ikki ætla at broyta nakað um úrslitið av dystinum, men at teir einans vilja hava leikbannið hjá málverjanum strikað.

– Formaðurin í kappingarnevndini hevur áður reist spurningin um at nýta video-upptøkur. Tí hava vit eina vón um, at kæran kann geva úrslit. Videoupptøkurnar sýna heilt greitt, at talan var ikki um brotsspark, og hóast dómarin dømir, so eigur talan heldur ikki at vera um reytt kort. Hetta tí álopsleikarin ikki hevði beina kós móti málinum. Tí vilja vit hava, at málverjin hjá okkum skal reinsast, sigur B36-formaðurin.

**-jm**



# Ósamdir klaksvíkingar

**Í Klaksvík viilja tey ikki uttan víðari hava sitandi á sær, at teir bara lótu vera við at møta upp til dystin, sum skuldi spælast móti AB leygardagin**

AB-KÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tvørturímóti siga tey í KÍ, at har er nógv gjørt, til tess at fáa dystin avgreiddan á besta ítróttarligan hátt.

Her eru boðini, at tað frá fyrstan tíð var ætlanin, at dysturin skuldi spælast sunnudagin. Hetta tí AB seinasta vikuskifti hevði fótbóltskapping, og at tað tí varð mett sum ivasamt, hvørt vøllurin var tøkur leygardagin. Hetta fekk KÍ skrivlig boð um longu í juni mánaði.

Ikki fyrr enn týsdagin í farnu viku fekk KÍ boð um, at AB kortini vildi hava dystin leiktan leygardag. Og tíðarfestingin var nú tann ringast hugsandi hjá KÍ. Nevnliga klokkan 18.00.

Klaksvíkingar siga, at teir síðani uttan úrslit royndu at broyta tíðarfestingina, soleiðis at dysturin kundi spæla fyrr um dagin, men hetta vildi AB ikki. At enda stóð tað venjaranum hjá KÍ greitt, at tað ikki bar til hjá teimum at manna lið, og tí vórðu boðini um avlýsing send AB á faxi.

Trupulleikin hjá KÍ í málinum tykist sostatt vera, at tann broytingin, sum tey hildu var galdandi fyri dystin, ikki er fráboðað Fótbóltssambandinum.

Kappingarreglurnar fyri fótbólt staðfesta, at tá kappingarskráin er løgd, kann hendan bert verða broytt av FSF. Tað plagar vanliga ikki at vera nakar trupulleiki, um feløg semjast um at flyta dyst, og síðani boða FSF frá hesum, men eingin slík fráboðan er komin til FSF í hesum førinum. Í aðrar mátar – altso so leingi sum dagfestingin er í samsvari við kappingarskipanina – er tað heimaliðið, sum ásetur klokkutíðina fyri dystin, tó treytað av, at hesin ikki verður leiktur í kirkjutíð.

Tí er einki ivamál um, at AB hevði fullan rætt at seta dystin á skránna kl. 18 leygardagin. Samstundis stendur tó greitt, at KÍ fram til týsdagin í farnu viku helt seg hava eina skrá, sum segði, at dysturin skuldi spælast sunnudag.

Tað eru so lutirnir, sum kappingarnevndin má fyrihalda seg til, og so er spurningurin, hvørja støðu hon kemur til í málinum.

## Rættleiðing

Í grein í blaðnum í gjár um gallaveitsluna fyri kappróðrarfólk, varð sagt, at veitslan varð hildin á Hotel Føroyum. Hetta var sjálvandi ikki rætt. Veitslan varð hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

**-jm**

# Hypotesur

Síðani tíðindini um væntandi dystin millum AB og KÍ bórust, hevur verið tosað dúgliga um, hvørjar avleiðingar hetta kann fáa fyri kappingina.

Enn hevur kappingarnevndin ikki tikið støðu í málinum, men soleiðis sum málið nú fyriliggur, eru allir møguleikar enn opnir. Bleytasta niðurstøðan í málinum er her, at nýggjur dystur verður ásettur millum feløgini, meðan talan í harðasta føri kann gerast um at tveita KÍ úr kappinginі.

Til stuttleikar, so hava vit spælt okkum eitt sindur við hesum seinasta møguleikanum fyri at vita, hvørjar ítróttarligar avleiðingar eitt slíkt stig vildi fyri kappingina í aðru deild.

Niðanfyri hava vit sett møguliga broyttu støðuna í aðru deild upp, og her framgongur, at tað í løtuni er B71, sum fær størsta fyrimunin við eini slíkari broyting. Sandoyingar vóru nevnliga fyri tapi, tá teir vitjaðu í Klaksvík fyrr í ár. Sama stað leikti AB javnt, so hóast teir í broyttu støðuni detta av øðrum niður á triðja pláss, so vildi hetta verið við einum dysti færri enn B71 opg TB.

Sostatt tykist TB vera liðið, sum – umframt KÍ – stendur seg ringast við hesum møguleikanum. Teir hava nevnliga sum tað einasta av oddaliðunum fingið fult ímóti KÍ, og tí vildu teir mist oddasessin í deildini.

**-jm**

## Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 33 | 15 | 18 | 24 |
| 2 AB* | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 18 | 13 | 5 | 23 |
| 3 B71 | 11 | 7 | - | 1 | - | 3 | 33 | 24 | 9 | 22 |
| 4 Royn | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 26 | 25 | 1 | 18 |
| 5 FSV | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 39 | 22 | 17 | 17 |
| 6 Sumba | 11 | 4 | - | 3 | - | 4 | 17 | 20 | -3 | 15 |
| 7 LÍF | 11 | 3 | - | 3 | - | 5 | 18 | 24 | -6 | 12 |
| 8 B36 | 11 | 3 | - | 2 | - | 6 | 15 | 32 | -17 | 11 |
| 9 KÍ* | 11 | 2 | - | 3 | - | 6 | 21 | 26 | -5 | 9 |
| 10 VB | 11 | 0 | - | 4 | - | 7 | 9 | 28 | -19 | 4 |

*) Í stigatalvuni her er roknað við, at AB vinnur dystin móti KÍ 0-0

## Støðan, um dystir hjá KÍ telja við

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 30 | 20 | 10 | 22 |
| 2 TB | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 29 | 14 | 15 | 21 |
| 3 AB | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 16 | 11 | 5 | 19 |
| 4 FSV | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 35 | 18 | 17 | 16 |
| 5 Royn | 10 | 5 | - | 0 | - | 5 | 22 | 22 | 0 | 15 |
| 6 Sumba | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 15 | 19 | -4 | 12 |
| 7 LÍF | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 17 | 23 | -6 | 11 |
| 8 B36 | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 9 | 28 | -19 | 5 |
| 9 VB | 10 | 0 | - | 4 | - | 6 | 9 | 27 | -18 | 4 |
| 10 KÍ | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |

## Eitt umfar manglaði

Í samband við stóru lesarakappingina, har møguleiki er at vinna eina ferð til dyst millum Manchester United og Liverpool, var eitt mistak komið fyri í leygardagsblaðnum. Her hendi tað nevnliga, at spurningar vóru teir somu, sum vóru prentaðir í fríggjadagsblaðnum.

Sostatt eru nógvir lesarar, sum nú halda seg mangla spurningarnar til fjórða umfar í kappingini. Fyri at fáa rættlag í aftur kappingina, verða spurningarnir fyri fjórða umfarið tí prentaðir niðanfyri.

Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

**-jm**



Klipp henda spurnarlepa út, og send til Sosialin

**1.** Hvør er fraklendingurin, sum í 1992 kom til Manchester United, og sum har gjørdist heilt stóra hetjan á liðnum, sum førdi felagið inn í eina nýggja gulløld?

Svar:

**2.** Í síni tíð varð hann dýrasti leikarin í bretskum fótbólti, og í fleiri ár var hann liðskapari fyri bæði Manchester United og Ongland. Hvør er miðvallarstríðsmaðurin, sum í 1981 kom til Manchester United úr West Bromwich Albion fyri 1,7 mió £?

Svar:

**3.** Kanska størsta fótbóltsidolið í heiminum í dag, hevur eisini borið reyðu troyggjuna við 7-talinum. Hvør er leikarin, sum í dag hevur nummar 23 í Real Madrid?

Svar:

**4. 7'ARAR Í MANCHESTER**
**Troyggjan við 7-talinum hjá Manchester United verður í dag borin av unga Christiano Ronaldo. Og hann er væl vitandi um trýstið, sum fylgir við hesari, tí júst 7-talið plagar í Manchester at fylgja teimum stóru stjørnunum.**

Navn:

Bústaður:

Telefon:

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
MB-TOURS

FØROYAPRENT